# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Andlát og jarðarferðir

**Maja Dalsgarð** av Argjum, andaðist í heiminum týsmorgunim 16. august, 89 ára gomul. Kistan kemur í Argja Kirkju fríggjakvøldið klokkan 20.00. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 14.00.

Tey, ið ynskja at minnast Maju, kunna lata eina gávu til Argja kirkju ella Oasuna í Hoyvík á konto í peningastovnunum.

Kistan við **Odnu Kyrjarheygg** fer av kapellinum á Norðoya Røktarheimi týsdagin klokkan 18:00. Jarðarferðin verður úr Betesda mikudagin klokkan 13:30.

Tey, ið vilja minnast Odnu, kunnu lata Norðoya Røktarheimi eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

**(Jonn) John Nielsen** Hvalba andaðist á Suðuroya Sjúkrahúsi mánadagin 15. august, 72 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Bjarni Magnussen** ættaður av Tvøroyri, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 14. august, 82 ára gamal. Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum leygardagin 20. august klokkan 13.00.

*Kelda: Útvarpið*

## Tøkk

Øllum tykkum, sum mintust meg á 70 ára føðingardegnum, vil eg bera eina hjartans tøkk. Takk fyri uppringingar, telegramm, blómur, gávur og vitjanir á degnum. Eisini vil eg takka fyri tað stóra yvirraskilsi eg fekk, tá fólk - púra óvart - stóð á gáttini, komin av flatlondum til tað sama. Takk til tann, sum skrivaði so vakurt um meg her í blaðnum. Konu, børnum, svigarbørnum og abbabørnum takki eg hjartaliga fyri, at tit gjørdu henda føðingardag fyri meg. Ein minniligur dagur, sum liggur kært goymdur í mínum hjarta. Takk øll somul. Gud signi tykkum øll.

*Blíðar heilsanir*
**Kjartan Z. Jacobsen**
**Klaksvík**

**80 ár**
Í dag fyllur Alexandra Michelsen, Tvøroyri, 80 ár.

**Dagurin**

**18. august. Agapetus,** deyður umleið ár 300. Ein 15 ára gamal drongur, sum var tikin av døgum fyri kristnu trúgv sína.

Ann Mari Debes, Argir:

## 25 ára starvsdag hjá Føroya Banka



Í dag, hósdagin 18. august 2005, hevur Ann Mari Debes á Argjum 25 ára starvsdag hjá Føroya Banka í Havn.

Ann Mari fór sum 18 ára gomul í læru sum bankaassistentur í táverandi Sjóvinnubankanum á Kongabrúnni, ið seinni bleiv lagdur saman við Føroya Banka.

Tá Ann Mari byrjaði, var Rasmus Olsen stjóri í Sjóvinnubankanum.

Hon hevur annars arbeitt á teimum ymisku deildunum hjá bankanum í Havn og eina tíð í Kollafirði. Hon hevur fyri tað mesta sitið við kassan.

Í dag arbeiðir hon sum kundaráðgevi í Føroya Banka í miðbýnum.

Ann Mari er dóttir Sólbjørg, f. Mortensen, og Hermund Zachariassen á Argjum, og hon er gift Fríðtóri Debes, ættaður úr Skopun, tey eiga børnini: Rakul og Jósva.

Samverkamenn:

## Stuðulskonsert á Nabb

**Tíðindaskriv**

Leygarkvøldið 27. august 2005 klokkan 21 verður ein stuðulskonsert í Ítróttarhøllini á Hálsi. Luttakandi bólkar á konsertini verða: Salt, Maria Anderssen og Heine Lützen. Eisini koma Absalon og dukkudreingirnir at luttaka.

Áðrenn sjálva konsertina er ein innandura fótbóltskapping, ið hevur fingið navnið »Logos kappingin«. Kappingin er eitt sindur øðrvísi skipað, soleiðis at um man t.d. bannar, so er tað 2 minuttir útvísing. Eisini verða 4 andaktir hildnar ígjøgnum dagin. Tað ber til at melda seg til fótbólts kappingina á tlf 227482.

Bæði tiltøkini eru við til at stuðla einum »Lærisveinaskúla í Pakistan« í føroyski trúboðanarfelagskapurin Samverkamenn skipa fyri. Konsertin er ókeypis, men inni í høllini verður høvi at geva til »Lærisveinaskúlan«.

Grundin til at man hevur valt at byrja ein lærusveinaskúla, er tí at í øllum Asia veksur kristindómurin sera skjótt, og har er stórur tørvur á bíbliuundirvísing. Á henda hátt kunnu vit undirvísa 30 asiatum, og teir kunnu so fara víðari og undirvísa øðrum í teirra lokalu samkomum.

Øll eru hjartaliga vælkomin í høllina 27. august. Les meiri um tiltakið á heimasíðuni: www.samverkamenn.org

Lesið Sosialin




HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ
Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin
"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo